Pornoinnrás í Havn á ólavsøku

Á 970 ára minnishátí› fyri Ólavi hinum heilaga, Noregs kongi, ver›ur høvu›ssta›urin fyri pornoinnrás úr grannalandinum Danmark. Tá koma Mona, Mille, Trine og Max øll til Føroya at blaka klæ›ini framman fyri ólavsøkugestunum í f‡ra dagar á ra›

Rúnar Reistrup

Um kanska forkunnugt ikki er ta› rætta or›i›, so er ta› í hvussu er ikki dagligur kostur hjá føroyingum at hava møguleika at fara til striptease.

Men á alsamt nærkandi tjó›arhátí› okkara ver›a ikki minni enn tvey stø› í Havnini, har stripparar vísa síni kynstur og naka› afturat.

Ta› eru danskir stripparar, i› koma hendanvegin, tí hendan vinnugrein hevur ikki rættiliga sligi› ígjøgnum í Føroyum, og tí er ta› ikki so vanligt at føroyingar strippa.

Tó so, ta› er ikki meira óvanligt og ótespiligt enn so at ta› finnst eitt føroyskt or› fyri hugtakinum striptease, nevniliga »nektardansur«.

Men hetta heldur óskyldiga føroyska or›i›, ver›ur ikki brúkt nú bæ›i Club 20 og Kaggin kappast um at l‡sa mest og best vi› sínum erotisku íslettum í ólavsøkuna.

Kaggin l‡sir vi› »Erotiskum dansi – Striptease vi› internationalu wetgirls Monu & Mille« og »Annarlei›is bor›servering«, sum ta› eitur í l‡singunum.

Club 20 l‡sir vi› »Donsku Trine, i› kann anna› enn bert at dansa...« og »Væltrimma›a hannd‡rinum Max til tey kræsnu føroysku konufólkini«.

Jú, føroyingar hava bókstaviliga sagt fingi› a›rar reyvar at láta í á ólavsøku farnu árini.

Myndirnar á hesum sí›um tók Jens Kristian Vang í Club 20 á ólavsøku í fjør, tá danski stripparin Maria vísti síni kynstur

Kaggin: – Vit hava brúk fyri onkrum ø›rvísi

Mona og Mille skulu syrgja fyri, at ólavsøkugestirnir hava eina gularót at stíla eftir, tá teir skulu strí›a seg ni›an brekkuna til Kaggan

Rúnar Reistrup

Dagarnir frá hósdegnum 27. til sunnudagin 30. vera serligir dagar í Kagganum.

Mona og Mille, sum Kaggin hevur fingi› til vega ígjøgnum »Stripperkongen« í Danmark, fara hesar dagarnar at dansa sonevndan erotiskan dans, ella strippa sum ta› eisini kallast, fyri Kaggagestunum.

Orsøkin til at náttklubbin hevur avgjørt at fáa stripparar heim til ólavsøkuna er, at ta› ikki er so lætt at fáa ólavsøkugestirnar at ganga teinin frá Áarvegnum ni›an í Kaggan.

– Kaggin hevur altí› veri› stongdur á ólavsøku, tí ta› hevur ikki loyst seg at hava opi›. Ta› vísir seg at fólk tíma ikki her ni›an ólavsøku, tí alt fólki› gongur ni›ri á Áarvegnum. So hevur man hugsa› sum so, at okkurt ø›rvísi skuldi til fyri at fáa fólk inn á gátt, og stripptease, ta› má sigast at vera ø›rvísi, siga tey úr Kagganum.

Stripparin skelka›i

Fyrstu fer› Kaggin hev›i stripptease á ólavsøku, var í fjør, og tá rigga›i væl. Annars hevur Kaggin bara einafer› fyrr havt stripparar á tapetinum, so í so máta er hesin náttklubbin eitt sindur óroyndari enn Club 20, har stripptease leingi hevur veri› fastur táttur á ólavsøku.

Fyrsta fer›in at Kaggin hev›i stripparar á vitjan var í apríl mána›i í fjør. Tá fóru strippararnir eitt sindur longri í sínum showi enn vænta›, og góvu fyrireikarunum ein lítlan skelk.

– Tá var ta› ikki bara erotiskur dansur, men sera, sera erotiskur dansur má man siga. Vit vóru óvitandi um at tær fóru at blaka øll klæ›ini og dansa sum tær gjørdu, so ta› kom eitt sindur óvart á okkum. Á ólavsøku í fjør var meira hóvligt, og ta› ver›ur ta› eisini í ár, siga tey úr Kagganum.

Sekstan show í part

Stripparárnir í Kagganum hava eina har›a ólavsøku framman fyri sær. F‡ra fylgjandi kvøld skulu tær strippa, og hvørt kvøld fara tær f‡ra fer›ir á pallin hvør. Fyrsta strippshowi› tey f‡ra kvøldini byrjar klokkan 21. Sí›an fer orkestri›, sum ólavsøkudagrnar ver›ur »All That Rain«, á pallin. Bólkurin heldur tríggjar ste›gir, og í teimum fara tær bá›ar genturnar á pallin og taka sær av at undirhalda gestirnar.

Undirhaldi› er kanska eitt sindur forkunnugt, men Í Kagganum halda tey ikki at stripptease er meira ósømiligt fyri tjó›arhátí› okkara, enn so nógv anna› á ólavsøku.

– Ta› er líka gott at man situr í Kagganum ella onkra a›ra sta›ni og hyggur eftir einum strippshowi, sum at man liggur og rullar á gøtuni í føroyskum klæ›um og Akvavitfløsku í hondini. Ólavsøkan er ein tignarlig hátí› fyri nøkur og eitt rukkulív fyri onnur, og vit standa mest kanska fyri tí seinna partinum, siga tey úr Kagganum.

Club 20: – Vit tryggja okkum gestir vi› stripptease

Í Club 20 hava tey valt at hava stripp fyri bæ›i mannfólki og konufólki. Hetta ver›ur gjørt fyri at tryggja sær fult hús ólavsøkudagarnar.

Rúnar Reistrup

Í Club 20 hevur ta› í eini 8 - 10 ár veri› fastur táttur at fingi› stripparar til Føroya á ólavsøku, og tann si›in hava tey onga ætlan um at broyta.

– Ta› koma nógv fólk til Havnar á ólavsøku, men hóast Club 20 liggur mitt í b‡num, so kann ta› gott vera nærum manntómt her inni, hóast fleiri túsund fólk eru í b‡num. Ta› veldst alt um ve›ri›. Er regn á ólavsøku, fáa vit ikki tiki› ímóti øllum fólkinum, men um ve›ri› er gott, kemur eingin inn, uttan so at vit hava okkurt serligt at bjó›a ólavsøkukvøldini, siga tey úr Club 20.

Og ta› serliga í ár eru gentan Trine Bæk Nielsen og drongurin Max, i› bæ›i eru vælskapt og til rei›ar at vísa ta›.

– Ólavsøkan er heilt einfalt ov umrá›andi fyri okkum til at vit kunnu seta okkum ni›ur og vóna, at ve›ri› ver›ur ringt, so at fólk koma inn á gólvi›. Vit mugu tryggja okkum, at ólavsøkugestirnir koma inn í Club 20, og ta› hevur víst seg, at strippshow er eitt vælegna› tiltak til hetta endamál, siga tey úr Club 20.

Skal vera sjáldsamt

Í Club 20 vænta tey, at hølini ver›a fullsett bá›ar ólavsøkudagarnar í hvussu er. Stripptease er eisini hóskvøldi› 27. og sunnukvøldi› 30., men tá er ikki vist, at náttklubbin ver›ur eins fullur av gestum.

Hóast nógvir stripparar eftir hondini hava vitja› í Club 20 ígjøgnum árini, so ansa tey væl eftir, at var›veita ta› sjáldsama vi› einum slíkum tiltaki.

– Í Reykjavík eru klubbarnir komnir eitt sindur illa fyri av tí. Har hevur veri› alt ov nógv stripptease seinastu árini, og nú er ta› blivi› so gali›, at fólk eru farin at krevja ta› hvørt vikuskifti›. Solei›is skal ta› ikki ganga her, tí tá gerst stripptease knappliga ein leypandi útrei›sla fyri okkum, heldur enn eitt »gesta-magnet« nú og tá.

Trine hava vit hitt fyrr

Strippararnar hava tey fingi› ígjøgnum »Stripperkongen« í Danmark, sum er agentur hjá øllum teimum best umtóktu stripparunum í Danmark, og sum hevur megna› at gerast nærum einará›andi á markna›inum fyri stripparar í danska kongaríkinum – harímillum í Føroyum og í Grønlandi.

Max »til tey kræsnu føroysku konufólkini« sum Club 20 málber seg í l‡singini, hevur ongantí› á›ur veri› í Føroyum í arbei›sørindum, men gentuna, Trine Bæk Nielsen, kennast fleiri føroyingar vi›.

– Hon var í Club 20 og strippa›i fyri tveimum árum sí›an. Hon er dugnalig og hevur seinastu tvey árini megna› at vunni› 2. pláss í kappingini um heiti› sum besti danski stripparin. Harumframt hevur hon innspælt millum fimm og tíggju pornofilmar, sí›an hon seinast var her á landi.

Undirbuksurnar skulu ongan veg

Í Club 20 hava tey fingi› at vita frá myndugleikunum, at so leingi strippararnir halda ymiskar reglur um hóvsemi, so er einki forgjørt í at geva fólk løn fyri lata seg úr klæ›unum framman fyri gestunum.

Hesar reglur innibera millum anna› sovor›i› sum at ein ávís fjarstø›a skal vera millum stripparan og ásko›ararnar, og at stripparin annahvørt skal lata undirbuksurnar vera, har tær eiga at vera, ella skal goyma kynslutirnar á annan hátt.

Og hesar reglur ætla tey í Club 20 at ansa eftir at halda, tí ta› loysir seg ikki at stramma streingin ov nógv, ver›ur sagt.

Og hóast ta› kanska ikki er eins væl dámt millum øll, so fáa tey í Club 20 ikki rey›ar kjálkar av stripparunum.

– Vit eru her fyri teir ungu ólavsøukgestirnar, og royna at geva teimum ta›, i› tey vilja hava. Um vit syrgja fyri, at ov ung fólk ikki sleppa inn, og at tey, i› eru inni, skikka sær væl, so er einki øgiligt í hesum. Tá er ta› nógv verri vi› teimum, i› rulla runt í Havnargøtum í føroyskum klæ›um, tí tey ikki dugdu at siga nei til teir bá›ar seinastu snapsarnar, siga tey úr Club 20 og bjó›a ólavsøkugestum og stripparum vælkomnum.



gult cyan magenta svart

gult cyan magenta svart